

*Morgunsendingin á Rás2 byrjar týsmorgunin kl. 09.00 úr Yndi Fitness við morgunvertinnunum á Rás2, Barbaru Holm og Mirjam Pætursdóttir*

# Rás2 brýtur mørk!

**Hesa vikuna er snøgt sagt lagt upp til buldur og brak á Rás2. Morgunvertinnurnar á Rás2, Barbara Holm og Mirjam Pætursdóttir, fara hesa vikuna at gera nakað, sum neyvan er roynt í føroyskum útvarpi áður. Tær fara nevniliga at lata seg tattoovera, og senda upplivingina í Rás2!**

RÁS2

Týsmorgunin sendir Rás2 beinleiðis úr Yndi Fitness, har kendi og vælumtókti tattoovørurin Michael Lomholt, fer at tattovera klaksvíkskvinnuna Evu Black, LIVE á Rás2.

Michael er ikki ein og hvør í tattooheiminum. Hann hevur millum annað stórar royndir við at tattovera kendar tónleikarar runt um í Norðurlondum, og ikki minst í Føroyum. Vit kunnu nevna, at SIC menninir allir hava fingið tattovering frá Michael Lomholt.

Og tá ið Nic og Jay vitjaðu í Føroyum, gávu teir sær eisini stundir til at fáa eina tattovering frá kenda dananum.

### Morgunvertinnurnar fáa eisini sítt

Tað er ikki bert Eva Black, ið skal tattoverast LIVE á rásini. Eisini morgunvertøinnurnar Barbara og Mirjam fara at lata seg tattovera, og verður tann parturin av sendingini sendur í morgunsendingini hósmorgunin.

– Tað var ætlanin, at vit báðar skuldi tattoverast LIVE í morgunsendingini, men vit hava ikki roynt tað áður, og tí tora vit faktist ikki at senda beinleiðis, meðan vit verða tattoveraðar. Kanska vit svíma av pínu meðan, og tað er nokso óheppið fyri lurtararnar hjá okkum, sigur Barbara Holm brosandi.

Lurtararnir fáa møguleika hjá Michael

Eins og vanligt er hjá Rás2, verður hendan vikan eisini merkt av vinningum, sum lurtararnir kunnu ogna sær. Og vælhóskandi til høvið, verður vinningurin í morgunsendingini týsmorgunin, tvey gávukort áljóðandi 1500 kr frá Michael Lomholt. Sostatt fáa tveir lurtarar møguleikan at fáa eina tattovering frá Michael Lomholt.

– Vit vita, at tað altíð er gravgangur eftir tattoveringum í Føroyum, tá ið tattovørar vitja her heima. Tí hava vit nú valt at varpa ljós á, at tað faktist er ein tattovørur, sum starvast fast í Føroyum. Tí vilja vit eisini geva lurtarunum hjá okkum møguleikan, at fáa eina feita tattovering frá Michael, sigur Barbara Holm.